
LÆRARABÓK

Rannveig Hovgaard
og John Næs Berg

Hervør og Høgni í triðja



Janus Guttesen,
Hannis Egholm
og Kari Roarsdóttir

Føroya Skúlabókagrunnur

Hugskot

Her ber til at lata børnini lesa um hvønn sín næming í flokkinum hjá Hervør og Høgna.

Eftir at hava lisið uppá heima, kunnu tey lesa hart fyri flokkinum og við egnum orðum greiða frá næminginum.

Umrøðuevni

Tosað verður um summarfrítíðina og um at byrja aftur. Hervør og Høgni hava fingið nýggjan næming í flokkin. Tosið um kenslurnar hjá báðum pørtum hesum viðvíkjandi. Tey hava eisini fingið teknmálstulk knýttan at flokkinum, og tey hava fingið eina nýggja lærugrein: danskt. Tosað kann verða um, hvussu ymiskir næmingarnir í flokkinum eru, hvussu eru teir líkir og hvussu eru teir ólíkir. Tosað kann verða um, hvussu stuttligt tað er, at nógv ymisk eru í einum flokki, so lærir tú okkurt nýtt og tú hittir nógv ymisk børn.

- Telduspøl
- At vera deyvur og um teknmál
  (Handstavraðið er á síðu 121 og plakat finst)
- Frímerki
- Fótbóltslið. T.d. enskur fótbóltur
- Dansur av ymsum slag
- Bøkur og at lesa
- Onnur lond, t.d. Ísland, Somalia
- Hervør dámar at lesa. Hvørjar bøkur halda tit, hon hevur lisið? Tað ber til at gera ein topp 10 lista
- Statistikkur av ymsum slag:
  t.d. yvir áhugamál, systkinatal o.s.fr.

Faktapartur


Ísland: Ísland liggur í norðara partinum av Atlantshavinum í útnyrðing úr Føroyum. Í 2008 var fólkatalið í Íslandi 313.376. Høvuðsstaðurin er Reykjavík. Eins og í Føroyum vóru tað norskir víkingar, sum búsettust í Íslandi. Sagt verður, at fyrstu niðursetufólkini komu til Íslands í 874.
Somalia: Somalia liggur í eystasta partinum av Afrika. Upprunafólkið í Somalia var somalifólkið, sum livdu sum flytifólk – nomadar. Til 1960 var landið býtt í Bretskt Somaliland og Italskt Somaliland, men í 1960 varð landið savnað undir einum við navninum Somalia.

Bókalisti

Arbeiðsbók Tekstaslag: *annað.*

- Arbeitt verður í bólkum, og í felag verður skrivað um bólkin á kortini. Tað ber eisini til at arbeiða einsæris. Myndir av næmingunum kunnu límast á síðurnar, ella teir tekna viðkomandi, teir hava skrivað um. Næmingarnir kunnu eisini gera eitt kort um seg sjálvan.
- Ein stjørnuuppgáva er eisini á síðu 7 í arbeiðsbókini. Hon er ætlað sum ískoytistilfar til teir skjótastu næmingarnar, sum eru lidnir við uppgávuna.

Svarlisti til arbeiðsbók



Hugskot

Hugna um stovuna, sum skal vera teirra stova í eitt ár.

Umrøðuevni

- Tosa um orðini, sum flúgva. Hvussu kennist tað, tá ið orðini flúgva um oyruni á tær? Til dømis tá ið tú ert ókendur onkustaðni og øll tosa rundan um teg. Samanber við Sofíu, sum stendur tigandi einsamøll mitt í myndini á síðu 10 og 11 í lesibókini. Hvussu man hon hava tað?
- Myndin á síðunum. Hvørji munnu hasi børnini vera, sum síggjast á myndini?
- Hvussu hava tey tað ... andlitsbrøgd?
- Ein ber brillur, hví ger hann tað? Kenna tit nakran, sum hevur brillur?
- Klædnabúni. Tosa um klæðir. Hvat halda tit vera hóskandi til skúlabrúks?

Faktapartur

Í dag verður byrjað í 1. flokki í skúlanum eftir summarfrítíðina, tá ið eitt nýtt skúlaár byrjar, men heilt upp í sekstiárini var vanligt í summum bygdum at fara í skúla tann dagin, tú fylti 7 ár.

Til 1974 varð eisini gingið í skúla leygardag.


Bókalisti

Arbeiðsbók

Tekstaslag: *tekstur*.

Her møta næmingarnir fyrstu ferð stavivenjingini. Tey kunnu hava staviorðini fyri heima ella tit stava tey í felag i flokkinum. Tey læra at prikka undir sjálvljóðini, hetta er ein góður máti at fyrireika seg til at fara undir at skriva fyrisagnir, sum koma í arbeiðsbók 2. Lesiveikir næmingar hava ofta trupulleikar við stavilsum í orðum, og tá ið teir prikka sjálvljóðini, verða teir meiri varugir við stavilsini og hjálpir hetta í síðsta enda til at stava rætt.

Svarlisti til arbeiðsbók



Hugskot

Tit kunnu spæla spølini, sum eru nevnd í søguni. Viðgerast kunnu onnur spøl, har vit syngja og røra okkum t.d. *Bro, bro brille*, *Tornurósa*, *Vit ganga runt um ein baraldarrunn*.

Umrøðuevni

Sangur og spøl

Sangspøl: Eitt sangspæl er eitt spæl, har rørslur, dansur og sangur fylgjast. Oftast eru tað børn, sum spæla sangspøl, men vanligt hevur eisini verið í Føroyum, at vaksin fólk spæla dansispøl. Nevnast kunnu úr rúgvuni *Gamla keta*, *Sandoyar dansur*, *Ríða Ediling*, *Sema nema*.

Av útlendskum sangspølum, sum eru vanlig í Føroyum, kunnu nevnast *Bro, bro brille*, *Tornurósa* og *Vit ganga runt um ein Baraldarrunn*.

Faktapartur

Føroyskur dansur stavar úr miðøld. Hetta er dansur uttan ljóðføri, ístaðin verður kvøðið. Føroyskur dansur hevur verið vanligur í stórum partri av Evropa, men nú er tað bara í Føroyum, at hann er livandi.

Ein skipari byrjar ørindini og alt dansifólkið fylgir við. Dansað verður soleðis, at farið verður tvey stig til vinstru og eitt til høgru. Hildið verður í hondina á síðumanninum, men vanligt er, at høgri armur er yvir og vinstri armur er undir hjá síðumanninum. Vanligt er at dansa í brúdleypi og til aðrar veitslur, í grind, ofta meðan bíðað verður eftir, at seðlarnir koma út.

Vanligur fólkasiður í samband við føroyskan dans: Góður dansisiður er at lurta eftir skiparanum og virða, at tað er hann, sum skipar. Tað vil siga, at hóast tú dugir ørindið, og hóast skiparin kvøður skeivt, so verður tað hildið vera ófólkaligt at taka av. Tað er eisini ósiður at trampa ov nógv, og tá ið t.d. brúðarvísan verður kvøðin, er tað ófólkaligt at tosa hart í ringinum ella runt um í rúminum, tí brúðarvísan er ein partur av vígsluni.

Hip Hop er dansur, sum byrjaði millum uppruna afrikanarar í Amerika í 1970´unum. *Hip Hop* er ikki bara dansur, men hevur fýra grundstig í sær:

- ***DJ´ing*** At venda plátum og scratcha yvir tær (Skøva tær – so eitt ávíst ljóð hoyrist)
- ***Rapping*** Tvs. tað er ein formur fyri at tosa á rútmiskan

hátt. Ofta verður rappað til tónleik

- ***Breakdansur*** Dansur, har nógvar akrobatiskar rørslur eru við, t.d. at snara runt á høvdinum
- ***Graffitti*** Málað/spreymálað verður á múrar, tok, hús o.a.

Í dag er *Hip Hop* kent um allan heimin.

Bókalisti


Marius Johannesen: *Føroysk barnaspøl.*
Læraranæmingar: *Káta*

Arbeiðsbók

Tekstaslag: *tekstur.*

Uppgávurnar **1** og **3** í arbeiðsbókini er við til at stuðla undir lesifatanina. Næmingurin má lesa frágreiðingarnar fyri at kunna svara rætt.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirað
Faktatekstur
Annað

Dansur og spøl

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 12-13

1 Lita

Mynd 1
skógvar: brúnir
sokkar: gulir
buksur: svartar
troyggja: reyð
hár: gult

Mynd 2
skógvar: reyðir
sokkar: gulir
buksur: grønar
troyggja: reyð
hár: gult

Mynd 3
skógvar: svartir
sokkar: grønir
buksur: gular
troyggja: svørt
hár: brúnt

Mynd 4
skógvar: grønir
sokkar: gulir
buksur: svartar
troyggja: grá
hár: brúnt

2 **Orð at stava** (Set kross við orðið, tá ið tú dugir at stava tað)

	Stavilsir	Sjálvljóðini	Skriva orðið
☒ hvussu	2	u - u	hvussu
☒ syngja	2	y - a	syngja
☒ hinum	2	i - u	hinum

10

3 Skriva rættan bókstav í rættan rút

Eg eri í gráum buksum.
Eg eri í reyðum skóm.
Eg havi rottuhalar.
B

Eg eri í gráum buksum.
Eg havi gult stutt hár.
Eg eri í grønari troyggju.
F

Eg eri í gráum buksum.
Eg eri í gráari troyggju.
Eg eri í bláum skóm.
Eg havi brillur.
E

Eg eri í bláum jakka.
Eg eri í hvítari blusu.
Eg eri í grønum buksum.
Eg eri í reyðum skóm.
D

Eg eri í grønum jakka.
Eg eri í reyðari blusu.
Eg havi sítt hár.
Eg eri í bláum buksum.
A

A B D E F

11

Hugskot

Umrøðuevni

- Tosa um, hvussu vit rópa grindaboð nú og hvussu gjørt varð fyrr, tá ið eingin telefon var (at glaða/at breiða)
- Góðkendar hvalvágir
- Skjóttgangandi bátar í dag í mun til árabátar fyrr
- Finningarhvalur/finningarfiskur
- Sosialt býti. Sjúkrahús og ellisheim fáa part
- Næmingar, sum hava verið í grind, sleppa at greiða frá
- Tosa um grind í mun til matin, sum vit keypa í dag
- Bjargingarvestar og bjargingarútgerð umborð á báti
- Djórapínsla
- Dálking

Faktapartur

Grindir eru deyðar nógvastaðni í Føroyum, hóast umstøðurnar hava ikki verið nøktandi.

T.d. vita vit, at grind er deyð í Lítla Dímun og í Tindhólmi.

Í 1985 vórðu hesar bygdir góðkendar sum hvalvágir: Bøur, Fámjin, Fuglafjørður, Syðrugøta, Húsavík, Hvalba, Hvalvík, Hvannasund, Klaksvík, Miðvágur, Norðskáli, Sandavágur, Sandur, Tórshavn , Tvøroyri, Vágur og Vestmanna.

Í 1985 varð eisini noktað at brúka hvalvákn og skutil, tí hetta varð mett sum djórapínsla.

Vit hava hagtøl yvir grindir heilt aftur til 1709. Í miðal leggja 1000 – 2000 hvalir beinini á hvørjum ári.

Í dag er lætt at boða frá grind við telefonini, men fyrr mátti t.d glaðast. Hetta var at kynda bál á ávísum stað, so fólk vistu, at nú vóru grindaboð. Um regn var, so breiddu tey. Eitt stórt hvítt klæði varð lagt á ávísum stað fyri at geva boðini. Eisini runnu menn bygdanna millum at boða frá grind.

Fólk eru á ymsum máli um, hvussu nógv eitt skinn av grind er. Summi siga 38 kg av tvøsti og 34 kg av spiki, meðan onnur siga 50 kg av tvøsti og 25 kg av spiki.

Tá ið hvalur verður skorin upp, verða leingjur av spiki, avlong spikstykki, fyrst skorin uttan av hvalinum, áðrenn komið verður inn á tvøstið. Hesar leingjur eita fjósir. Fremsta fjósin, har bøkslið er skorið úr, eitur handafjósin. Hon hevur sjálvsagt eitt hol í, har bøkslið er skorið burturúr.

Rustspik er ovara og niðara rød á hamarstjøli.


Hann, ið boðar frá grindini, fær største hvalin í finningarløn.

Bókalisti

Arbeiðsbókin Tekstaslag: *tekstur*.

Uppgáva **2** er løtt at loysa við at næmingurin hyggur í lesibókina og finnur røttu heitini, sum síðan verða skrivað í heftið.

Svarlisti til arbeiðsbók



Grindaboð

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 14-15

Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirað
Faktatekstur
Annað

1

Set runding um tað rætta	Ja	Nei
Virgar er einsamallur inni	S	Ð
Pápin vaskar klæðir	L	U
Grindin er uttan fyri Nesið	P	K
Rannvá, Kristina og Óli spæla fótbólt	R	O
Pápi Virgar eitur Símun	M	B
Havgásin startar fyrstu ferð	I	Æ
Grindin ger landgongd	K	V
Grindin er umleið 1000 hvalir	E	D
Børnini hava ofta verið í grind	A	Y

JA gevur s p i k

sóknar-ongul

2 Set rætt navn á amboðini

blástur-krókur

grinda-knívur

3 Ger teknirað um søgugongdina.

Tey fáa boðini	Tey fara í bátin	Tey fara út eftir fjørðinum
Tey reka	Grindin er deyð	

4 Set rætt orð inn

Virgar er einsamallur inni.

Mamman er farin at keypa. Pápin, Heini og Jón eru úti í túni og vaska bil.

Telefonin ringir, og Virgar tekur hana.

„Ja, tað er Virgar.“

„Er tað tú, góði? Hetta er gubbi. Hvar er pápi tín?“

„Hann vaskar bil.“


„Sig við hann, at vit liggja við eini grind uttan fyri Nesið. Vit eru bara tveir bátar, so skundið tykkum út við Havgásini.“

5 Tekna ein hval í rammuna og skriva eina søgu um hann í skriviheftið

hvalvákn

12

13



Hugskot

Um tað ber til, kann verða farið í skúlakøkin at baka. Hetta kann kanska eisini verða gjørt í samstarvi við læraran í heimkunnleika.

Har tað ikki er gjørligt at baka í skúlanum, kann verða heitt á foreldrini at baka við næmingunum heima, so kunnu tey hava tað við í skúlan og eta í felag.

Ein partur av at baka og arbeiða í køkinum er eisini at læra næmingarnar at lesa uppskriftirnar og læra styttingarnar, at borðreiða, møguliga gera sær ómak við at leggja serviettar, tendra ljós og henta blómur úti at seta á borðið.

Uppskrift upp á drýl (úr *Matur og matgerð*)

375 g av rugi
500 g av hveiti
1 ts av salti
2 ts av natron
2 ts av bakipulvuri
½ l av vatni

Elt alt tilfarið saman og ger tveir drýlar.

Hita ovnin til 200° og baka mitt í ovninum í 45 min.

Umrøðuevni

- Matur í ymsum londum
- Borðsiðir
- Borðbønir ella sangir

Faktapartur

Heilt aftur í steinøld hava fólk bakað breyð. Tá rørdu tey vatn og mjøl saman. Á okkara leiðum er drýlur dømi um breyðslag, sum stavar úr víkingatíðini. Drýlur varð bakaður av mjøli og vatni, skorpaður á ringunum ella í eiminum, síðan bakaður í steinovni.

Breyð hevur verið høvuðsmatur í Evropa, alt fólk vita um. Í Grikkalandi bakaðu tey breyð 4000 ár fyri Krist.

Hveitibreyð var roknað sum lystimeti hjá tí fínara fólkinum heilt upp í 1900 talið, meðan vanliga fólkið át grovari breyð. Hveiti og bygg vóru fyrstu kornsløgini, sum fólk fóru at velta fyri umleið 10.000 árum síðan. Nógv fólk høvdu korn í Føroyum til umleið 1940´ini. Tað var bygg, sum vaks her.

Borðsangir, sum vanligir eru at syngja, tá ið farið verður til borðs:

Í meðan mangur svangur er
vit kunnu setast niður her
og fáa mat so hjartans glað
og Gud vit takka fyri tað

og

Vit takka úti vit takka heima
at siga takk mugu vit ikki gloyma
tí góði Gud eg vil takka tær
fyri hvørja gávu tú gevur mær.

Frá borðinum: (verður mest sungið, tá veitsluborðhald endar)

Tær vit takka, góði faðir
sum so væl oss reiddi borð,
fyri mat og fyri klæðir,
fyri sæla lívsins orð.

og

Várt borðhald er at enda,
og borðum berst nú av,
at tær vit okkum venda,
ið góðar gávur gav;
á kristna fedra sið,
tær lov, o, Gud vit syngja
tú vildi styrkja, yngja
og metta hetta lið.

síða 17

Hugskot

Her verður farið í smíðstovuna at saga tað skapið, sum tit vilja hava. Tit kunnu eisini heita á foreldur ella smíðlærara at saga skapið fyri tykkum.

Tit kunnu eisini seyma eitt klæði at leggja í botnin á kurvini.

Hugskot

Lurtið eftir fløguni og lesið í felag teknisøguna. Hesin teksturin er eitt sindur trupul hjá næmingunum at lesa, tí málið er tað sama sum í føroyingasøguni, tað vil siga eitt sindur gamalt mál við nøkrum truplum orðum. Vit halda tað kortini vera gott, at næmingarnir viðhvørt lesa tekstir, sum eru truplari, og møta øðrum tekstaslagi, tí tað er ein avbjóðing at klára hesa uppgávuna. Fyri at lætta um hjá næminunum, kann lærarin greiða frá truplum orðum, áðrenn teksturin verður lisin. Lærarin metir um, hvørji orð eru neyðug at skilja, fyri at fata tekstin.

Um tað er møguligt, kann verða vitjað í onkrum av teimum støðunum har høvuðspersónarnir í teknisøguni livdu t.d.

- Gøtu – har Tróndur búði
- Skúvoy – har Sigmundur búði
- Sandvík – har Torgrímur búði
- Hovi – har Leivur Øssurson búði

Umrøðuevni

Føroyingasøga er væl egnað sum framhaldsbók at lesa fyri næmingunum.

Finn bygdirnar í søguni. Hygg í eitt Føroyakort at kunna teg um svimjileiðina hjá Sigmundi.





Faktapartur

Minnisvarðar eru at síggja í Skúvoy, Sandvík og í Havn yvir Sigmund Brestisson. Hesir minnisvarðar eru reistir í sambandi við 1000 ára haldið fyri kristniboðanina í Føroyum.

Somuleiðis er minnisvarði yvir Trónd reistur í Gøtu.

Í Skúvoy verður víst á Sigmundar grøv. Í Hovi kanst tú síggja grøvina hjá Havgrími, sum var abbi Leiv Øssurson. Skúlin í Hovi stendur í Leivsgarði (úttalað Lossgarði). Í Sandvík verður víst á Sigmundargjógv.

Víkingatíðin í Føroyum vardi frá búseting uml. 825 til Tróndur í Gøtu doyði uml. 1035. Aftan á Trónd varð Leivur Øssurson at rokna sum størsti høvdingurin í Føroyum. Størsta nýbrotið í hesum tíðarskeiðnum var, at Sigmundur Brestisson kom við kristniboðanini til oyggjarnar. Einastu skrivligu keldur um hesa tíðina er Føroyingasøga, sum varð niðurskrivað í Íslandi. Her verður eisini skrivað um, tá ið Sigmundur svam úr Skúvoy til Sandvíkar, men í Føroyum hevur altíð verið hildið, at hetta er skeivt, tað kann bara vera úr Stóru Dímun, at hann kann hava svomið.

21. juli 1972 svumu Birgir Enni og Thorstein Holm sama strekkið, sum hildið varð, at Sigmundur svam. Teir høvdu ávikavist 4 tímar og 20 minuttir og 4 tímar og 30 minuttir um teinin.

Í áttanda bindi av Varðanum greiðir Jóannes Paturson frá samrøðu, hann hevur havt við Enokk á Skarvanesi. Enokkur visti at siga, at tað hevur verið fortalt munn av munni í Skúvoy, at Tóra dóttir Sigmund hevði føðingardag á Mikkjalsmessu, 29. september, og at Sigmundur henda dag hevði stórt drykkigildi. Hetta visti Tróndur, og tí eydnaðist tað honum at herja á Sigmund.

Fischer Heinesen kannaði fyri Froskmannatíðindi streymlíkindini, sum vóru um Suðuroyarfjørð 29. september 1002, og kom fram til, at tá hava verið av frægastu líkindum.

Bókalisti

Føroyingasøga - Varðin 8. bind - Froskmannatíðindi
Søgu- og sagnarkort frá Sandoyar Kunningarstovu.



Arbeiðsbókin

Tekstaslag: *søgn* og *teknirød.*
Nú verður farið at arbeiða við orðum, sum skulu skrivast við stórum. Í uppgávu **4** skulu næmingarnir finna nøvn við ávísum byrjannarbókstavi. Her eigur at verða tosað um, at fólkanøvn og staðarnøvn skulu skrivast við stórum.

Uppgáva **5** er nýggj málløruuppgáva, har næmingarnir skulu býta orð í sagnorð og navnorð. Tú kanst læra næmingin at kenna navnorð við at seta *ein* ella *eitt* frammanfyri ... tosa um, hvussu nógv navnorð eru at finna í floksstovuni. Sagnorð kennir tú við at seta *at* ella *eg* frammanfyri, t.d. *at hoppa* ella *eg hoppi*. Næmingarnir kunnu gera onkra rørslu, sum vísir eitt sagnorð, t.d. renna, skriva, lesa osfr., og so skulu hini gita sagnorðið.


Svarlisti til arbeiðsbók

Tekstur
Ævintýr
× Søgn
Yrking
Sangur
× Teknirað
Faktatekstur
Annað

Sigmundur og Tróndur

2 BYRJAN

Finn veg gjøgnum villiniborgina



Loysnin: TURIÐ MEGINEINKJA

3 Orð at stava (Set kross við orðið, tá ið tú dugir at stava tað)

	Stavilsir	Sjálvljóðini	Skriva orðið
× hvør	1	ø	hvør
× skilja	2	i - a	skilja
× gera	2	e - a	gera
× kann	1	a	kann
× fáa	2	á - a	fáa
× niðan	2	i - a	niðan

16

4 Skriva nøvn á fólki, sum byrja við hesum bókstavunum

S	
I	
G	
M	
U	
N	
D	
U	
R	

5 Být hesi orðini sundur í navnorð og sagnorð

maður, lesa, navn, detta, doyggja, bátur, øks, vápn, eiga, hond, snodda, oyggj, skip, møl, svørð, svimja, kasta, búgva, hús, ringur.

navnorð	sagnorð
maður	lesa
navn	detta
bátur	doyggja
øks	eiga
vápn	snodda
hond	svimja
oyggj	kasta
skip	búgva
møl	
svørð	
hús	
ringur	


6 Fortel við egnum orðum í skriviheftinum um Sigmund og Tróndur

17

Hugskot Næmingarnir kunnu sjálvir skriva søgur.

Umrøðuevni

- Tosa um rottur og mýs sum skaðadjór – oyðileggja t.d. eplaveltir og koma í hjallin
- Hvat gera vit fyri at týna rottu, tí tær nørast skjótt? fellur – gift – kettur
- Tey eta rottur o.a. í øðrum londum – tosa um tað
- Í summum oyggjum eru t.d. ongar mýs
- Mýs og rottur sum kelidjór!
- Kelidjór í síni heild
- Vís næmingunum á kortinum hvar Norðpólurin og Kina eru. Onkur dugir helst at finna Føroyar
- Google Earth
- Greiða eitt sindur frá, hvat kavi er





Faktapartur

Kina Skalt tú siga nakað um Kina, mást tú brúka stór tøl. Kina er 9.5 mió. km^2. Skrivaða søga landsins er 3500 ára gomul, men fólk hava búð har í 500.000 ár.

Har býr ein fimtingur av øllum fólkum í heiminum.Tað er ringt at breyðføða so nógv fólk, og tí fáa foreldur, sum ikki fáa fleiri enn eitt barn, virðisløn.

Kinverjar hava t.d.uppfunnið pappírið, blekkið, skriftmálið, silkið, prentkynstrið og krútið.

Kinamúrurin er heimsin longsti verndarmúrur. Hann er 3460 km langur. Í støðum er hann 16 m høgur og 8-9 m breiður.

Shih Huang keisari lat múrin laða at verja Kina fyri álopi norðaneftir úr Miðasia.

Kina er fólkaríkasta land í heiminum.

Átrúnaður er mest Buddatrúgv.

Høvuðsstaðurin í Kina eitur Beijing, har olympisku leikirnir 2008 vórðu hildnir.

Høvuðsvinnan er landbúnaður og ídnaður.

Gjaldoyrað í Kina eitur yuan.

Norðpólurin Norðast og sunnast á Jørðini eru oyðin lond við nógvum kava og ísi. Uttan um Norðpólin er Arktis og um Suðurpólin er Antarktis. Á hesum leiðum er sólin undir helvtina av árinum, og hina helvtina skínur hon alt summarið. Í støðum er ísurin 2000 m tjúkkur.

Á hesum leiðum liva dýr, ið tola sera nógvan kulda t.d. ísbjarnir, kópar og pingvinar.

Kaldastu lond á Jørðini vórðu seinast kannað, og enn nú á døgum ger nógvi kuldin og tann bítandi vindurin, at tað er torført at gera rannsóknir á pólleiðunum. Fyrstu ferðirnar vórðu gjørdar við skipum so langt siglandi var. Síðani varð hildið fram á skíum og á hundasletum.

Nógvir menn hava latið lív á hesum ferðum.

Í 1909 eydnaðist amerikumanninum Robert Peary at verða fyrstur á Norðpólinum.

Nevnast kann, at norðmaðurin Roald Amundsen varð fyrstur á Suðurpólinum í 1911.

Kavi Kavi er vatndampur, sum frystur høgt uppi í luftini og síðani dettur niður sum kavi.

Ongin kavaflikra er eins, verður sagt.

Skaðadjór Sum orðið sigur, so er skaðadjór til skaða. Rottur og mýs eru ikki til gagn og tí óynskt.

Kommunur hava skyldu til at hava eina virkna týning av skaðadjórum, eins og fólk skulu gera sítt til, at skaðadjór ikki spjaðast.

Matframleiðandi virki skulu somuleiðis hava eina skipaða fyribyrging og týning av skaðadjórum. Hetta fyri ikki at spjaða smittu til matvøruna. Dømi um skaðadjór í mun til matvøruframleiðslu eru flogkykt, fuglur, rotta, hundur, ketta og seyður.

Fyribyrging kann millum annað vera at hava tættan bygning, flugunet fyri vindeygu, at reint og ruddiligt og avbyrgt er uttan um virkið.

Týning kann vera rottueitur, músafella, flugudrepari og líknandi.

Tað er ymist, hvar vit finna rottur og mýs í Føroyum. Í summum oyggjum er bara annað slagið, men í øðrum eru bæði sløgini. Nakrar oyggjar eru, har hvørki mýs ella rottur finnast, t.d. í Kalsoynni, í Koltri og í Stóru Dímun.

Bókalisti

Fischer-Nagel, Heiderose: *Kettan leggur*
B.B. Møller: *Ansa tær lítla mús*
Fisker, Robert: *Tann hvíta og tann gráa músin*
B.B. Møller: *Kettan, sum hvarv*
Dorete Bloch og Edward Fuglø: *Villini súgdjór í Útnorðri (FSG, 1999)*

Arbeiðsbók

Tekstaslag: *annað.*

Aftast í lesibókini er orðalisti, sum skal brúkast til uppgávu **2**.

Tað verður lagt upp til, at næmingarnir arbeiða meira í einum eyka skrivihefti, t.d. uppgáva **3** og **4**.

Svarlisti til arbeiðsbók

Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

3. flokkur skrivar

1 Spyr onkran, sum hevur kettu

Navn	Kettan eitur	Frensur	Løða

2 Hygg í orðalistan

Orðið í orðalistanum	Orðið aftaná
magnet	mamma
ofta	og
passar	pápi
eru	eta
nei	nekarakyss

Loysnin er

3

Um meg

Eg eiti Hervør Nielsen, og eg eri 9 ár. Eg havi føðingardag 6. august. Pápi mín eitur Pauli, og mamma mín eitur Sanna. Eg eigi ein beiggja, sum eitur Høgni. Vit eru tvíburar. Vit búgva í Handaruvík.

1) Skriva hetta av í skriviheftið
2) Brúka somu yvirskrift og fortel so um teg
3) Tú kanst eisini tekna húsini og húsfólkini hjá tykkum í skriviheftið.



18

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 24-25



4 Skriva eitt ævintýr
(um ov lítið pláss er, kanst tú halda fram í skriviheftinum)

Minst til:

1 Einaferð var tað ...
2 3 ferðir
3 Endi

19

Hugskot

Lurta eftir fløguni, og skiftist so um at lesa ramsurnar hart. Vita hvørjar av hesum ramsunum, næmingarnir duga. Siga tey júst tað sama, ella siga tey eitt sindur øðrvísi? Tosa um skaldskap av mannamunni.

Umrøðuevni

Tosið um aðrar ramsur, sum næmingarnir kenna. Ofta hava børn í ymsum londum somu ramsur. Tosa um, hvussu tær verða lærdar yvir landamørk. Tosað verður um, hvussu tey ena, Tit kunnu eisini gera eina kanning at vita, hvussu tey ena, hvussu foreldrini og ommur og abbar hava enað.

Faktapartur

Tá talan er um skaldskap á mannamunni verður oftast hugsað um søgur, sagnir, sangir, kvæði og annað, sum ikki er niðurskrivað, men er latið víðari frá einum ættarliði til tað næsta.

Eitt gott dømi um slíkan skaldskap eru okkara kvæði. Kvæðini livdu í fleiri øldir millum fólk, sum lærdu tey við at hoyra tey kvøðin. Nógv fólk vilja vera við, at kvæðini eru orsøkin til, at føroyska málið hevur yvirlivað.

Í summum afrikanskum ættarbólkum eru menn, sum hava lært seg alla søguna hjá sínum ættarbólki, øll nøvn og allar hendingar gjøgnum fleiri ættarlið. Hetta duga teir alt uttanat og kunnu so lata søguna víðari til onkran annan í ættini, tá ið teir gerast gamlir.

At ena verður ofta brúkt, tá ið eitt barn skal finnast til eina ávísa uppgávu. Til dømis at verða tann sum blundar, tá ið tey spæla krógva og blunda. Mátin, hetta kann verða gjørt, er, at børnini standa í eini langari rød lið um lið og ein enar. Meðan eitt ørindi verður sagt t.d. *Trý ross* verður peikað á eitt barn fyri og annað eftir. Tað seinasta, sum verður sagt t.d. ... *tað*

Tá ið Virgar enar, sigur hann:

Trý ross stóðu á einum bási.
Eitt breyt ein rút
og slapp út.
Tað var nettupp tú.

var nettupp tú, er so galdandi, tvs., at tann, sum peikað verður á, tá ið enarin sigur *tú* , sleppur burtur úr. Hildið verður fram til bara ein er eftir, sum so skal blunda ella *verða*.

Bókalisti

Birgitta Hylin: *Trumm, trumm, trall la la* (BFL)


Arbeiðsbókin

Tekstaslag: *annað.*

Nú kemur fyri fyrstu ferð ein lítil málløruuppgáva, har næmingarnir skulu seta sagnorð í tátíð.

Til uppgávu **4** ber til, at hvør næmingur ger sær sína lítlu bók við ramsum. Tað ber eisini til at gera eina felags mappu ella bók, har eniramsur og aðrar ramsur verða skrivaðar í. Næmingarnir kunnu fara heim at vita, um tey kenna aðrar ramsur ... stuttligt við nógvum ymiskum ramsum.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Munnfitt børn

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 26-27

1 Set rætt orð inn

Heini breyt beinið á køstasteini.
So kom ein stari pikkaði hann í lærið.
Heini at gráta og starin at láta.

Trý ross stóðu á einum bási.
Eitt breyt ein rút
og slapp út.
Tað var nettupp tú.

2 Skriva orðini í tátíð

at eta	í gjár	át	hann/hon
at duga	í gjár	dugdi	hann/hon
at siga	í gjár	segði	hann/hon
at ena	í gjár	enaði	hann/hon
at læra	í gjár	lærdi	hann/hon
at bróta	í gjár	breyt	hann/hon
at gráta	í gjár	grætt	hann/hon
at láta	í gjár	lætt	hann/hon
at pikka	í gjár	pikkaði	hann/hon

3 Hygg í orðalistan

Orðið í orðalistanum	Orðið aftaná
eggini	ein
faðir	fagott
ofta	og
eggini	ein
troyggja	trumma
torvatrøll	tosa
inni	í
fara	fartelefon

Skriva setningin: ein fagott og ein trumma tosa í fartelefon

4 Arbeiðið saman í bólki. Farið og spyrjið fólk um aðrar ramsur. Gerið so hvør sína plakat at heingja upp.

RAMSUR
ENA MENE

PIFF PAFF PUFF

20 21

Eg lyfti ein stein • Puff mín loynidreki • síða 28-29

Hugskot

Her er eitt gott høvi at venja upplestur av bundnum máli. Yrkingin á s. 28 er so løtt, at hon kann saktans lesast uppá heima og síðani lesast upp í skúlanum.

Umrøðuevni

- Greið næmingunum frá um endarím
- Greið næmingunum frá, hvat eitt dulnevni er – gev dømi
- Tosa um vøgguvísur og spyr næmingarnar um dømi
- Tosa um gandaringar og sjórænarar/fløgg
- Tosa um drekar

Faktapartur

Óðin Ódn er Levi Niclasen. Levi er føddur 1943 og er lærari. Levi er tó fráfarin nú vegna aldur. Hann hevur útgivið fleiri yrkingasøvn og onkra stuttsøgu. Annars hevur hann gjørt fleiri fittar barnasangir.

Steintór Rasmussen er føddur í Klaksvík í 1960 og er lærari. Steintór er kendur tónleikari. Hann er maðurin aftanfyri Kular Røtur og hevur m.a. spælt við Frændur og hevur yrkt og føroyskað nógvar sangir, t.d. Puff the Magic Dragon, sum Leonard Lipton og Peter Jarrow úr amerikanska bólkinum Peter, Paul and Mary hava gjørt. Bólkurin var sera væl umtóktur fyrst í sekstiárunum.

Dulnevni er uppfunnið navn, loyninavn, sum t.d. rithøvundur nýtir til at loyna hvør hann er.
Dømi um dulnevni: Óðin Ódn – Levi Niclasen
Gideon – kári p
Regin í Líð – Rasmus Rasmussen
Heðin Brú – Hans Jacob Jacobsen

Ein ***dreki*** er ævintýrvera, djór við ormakroppi og veingjum. Víkingaskip kunnu hava stevni líkum drekahøvdi - drekaskip. Vit kenna eisini kappróðrarbátar við drekastevni.

Bókalisti

Føroyskir fólkaskúlalærarar, s. 327 og s. 402 har Levi og Steintór eru umtalaðir.
Trumm, trumm tralala.
Drekin hjá pápa (BFL 1993)
Elmar og drekin (BFL 1994)
Drekarnir á Blálondum (BFL 1994)
Drekar (í Strok nr. 2, 2007)

Arbeiðsbókin

Tekstaslag: *yrking* og *sangur*.

Uppgáva **1**: Her verður lagt upp til, at næmingarnir sjálvir skulu skriva eitt sindur meiri. Lærarin eigur at hjálpa teimum at býta frásøgnina upp í byrjan, innihald og enda.

Uppgáva **2** er bólkaarbeiði, har dentur verður lagdur á at spæla við ljóðum, gera smá rím í felag.

Uppgáva **5** er ætlað teimum skjótastu næmingunum sum eykatilfar.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Sagn
Yrking
Sangur
Teknirað
Faktatekstur
Annað

Eg lyfti ein stein

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 28-29

1 Skriva yrkingina um til eina søgu

1 Byrjan – Einaferð skuldi eg ...
2 Hvat hendi so? – steinurin tungur, drongurin ungur ...
3 Endi – Hvat segði pápi?

Einaferð skuldi eg

2 Gerið smá rím í felag

Kettan datt – í ein hatt

22

Puff, mín loynidreki

3 Finn øll djórini, sum eru nevnd í sanginum og skriva tey her

(loyni)dreki
bláhvalir
nísur
skjaldbøka

4 Skriva upp øll endarímini

býr	ævintýr
ting	umkring
tær	mær
teg	seg
sandi	land
nátt	gott
slott	flott
fekk	vekk
tár	ár
lag	ja

5 Hygg at myndini ovast og skriva eitt ævintýr í skriviheftið

Minst til:

1 Einaferð var tað ...
2 3 ferðir
3 Endi

23

Hugskot


Umrøðuevni


- Norrøna gudalæran
- Vikudagarnir á ymum málum
- Fløgg

Faktapartur

Norrøna gudalæran byggir á germanska trúgv. Nøvnini á gudunum líkjast í øllum norðvest Evropa. Gudarnir vóru teir sum borgaðu fyri: Mentan, rættvísi, ríkidømi,vísdómi og grøði. Gudarnir vóru býttir í tveir ættarbólkar: ásagudarnir og vanarnir. Tann størsti bólkurin var ásagudarnir, har Óðin og Tór eru teir kendastu. Jatnarnir vóru teir óndu gudarnir, sum royndu at fáa valdið í heiminum alla tíðina, so ofta verður tosað um teir góðu gudarnar – ásarnir og vanarnar – í bardaga móti teimum óndu: jatnunum. Hildið var, at verðin fór at ganga undir í Ragnaroki, tá tann endaligi bardagin millum gudarnar skuldi fara fram. Teir góðu gudarnir búðu í Ásagarði, sum lá mitt í verðini.














Óðin Verður í eldri søgnum lýstur sum høgur, gráskeggjutur og einoygdur. Hann varð sagdur at hava ein áttabeintan hest Sleipnir. Eisini hevði hann tveir ravnar Hugin og Munin. Óðin verður oftast roknaður sum høvuðsgudurin, men var eisini roknaðir sum krígsgudur.


Tór Var elsti sonurin hjá Óðini og var roknaður sum torugudurin og sostatt tann gudurin, sum valdaði veðrinum. Tí var Tórur ein týdningarmikil gudur, tí tað var hann, sum ráddi fyri, hvssu stórur ávøkstur var, tí hann stjórnaði veðrinum. Kona Tór var Siv.

Týr Hann er krígsgudurin burturav. Hann misti høgru hond sína, tá ið hann leinkjaði Fenrisúlvin. Eftir yngru Eddu er Týr sonur Óðins, eftir Hymirkvæðinum er hann sonur jatnan Hymir.

















Frigg er kona Óðins. Navn hennara merkir, tann sum elskar. Frigg er ein sera klók gudinna, sum ofta ráðgevur Óðini- Frigg er gudinna fyri hjúnarlagnum. Tað varð biðið til hana í samband við barnsburð, og mammur bóðu ofta til hana um kríggseydnu fyri synunum.

Rúnarraðið Orðið rúnar merkir loynidómur. Rúnirnar eru bókstavir, sum vórðu høgdir oftast í stein. Seinni uppi í miðøldini verða rúnirnar eisini høgdar í træ. Vit hoyra í Føroyingasøgu um Trónd í Gøtu, at hann var ein sera vitugur maður, sum eisini varð lagdur undir at duga gand. Tey, sum dugdu at lesa tá í tíðini, vórðu ofta roknaði sum køn í gandi. Í kvæðinum um Leiv Øssurson, tá Tróndur fer til Suðuroyar at finna Torgrím, verður sagt, at hann hevði rúnarkelvi við sær. Eitt kelvi er eitt runt træpetti.



Bókalisti

Norrøn gudalæra
Teknirøðirnar um Valhøll
Eingin letingi, á s. 119 í Hervør, Høgni og hini (FSG, 2004)


Arbeiðsbókin

Tekstaslag: *tekstur.*

Her kann verða arbeitt rættiliga nógv við rúnarraðnum. Rúnarraðið, sum her er brúkt, er samansett av eldru og yngru rúnarrøðum. Tað ber til at skriva nøvnini á næmingunum í flokkinum, tey kunnu høgga rúnarstavir í stein, ella tey kunnu gera sær hálsprýði av rúnum, t.d. við at brúka leir ella fimo.

Alt rúnarraðið kann eisini gerast í gandadeiggi, soleiðis, at bókstavirnir verða býttir ímillum næmingarnar, og raðið kann verða hongt upp inni í flokshølinum.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Vikudagarnir

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 30-31

a (á) b d (ð) e f g h i (í) j (c) k

l m n o (ó) p r s t u (ú) v æ ø

1 Svara spurningunum

Hvussu eitur	Svar
Sunnudagur á grønlendskum?	sapaat
Mánadagur á íslendskum?	mánudagur
Týsdagur á donskum?	tirsdag
Mikudagur á enskum?	wednesday
Hósdagur á íslendskum?	fimmtudagur
Fríggjadagur á enskum?	friday
Leygardagur á grønlendskum?	arfinninngorneq
Hvussu kallaðist hesturin hjá Óðini?	Sleipnir
Hvørjum eitur týsdagur eftir?	Týr
Hvussu kallaðist kona Óðins?	Frigg
Hvat merkir leygardagur?	vaskidagur

2 Skriva fólkanøvn

Okkara stavrað	Rúnir
Hervør	ᚺᛖᚱᚡᛟᚱ

3 Skriva eini loynilig boð við rúnum í skriviheftið

24

25

Hugskot

Teknirøðin kann verða lisin upp sum ein leikur, har hvør næmingur fær sín leiklut (lit).

Umrøðuevni

- Frávik og líkleikar. Litirnir gera eina felags mynd, tá ið teir skilja, at best er at arbeiða saman. Næmingarnir kunnu yvirføra eginleikarnar hjá litunum á menniskju og samanbera
- Litlæra
- Litcirkul
- At vera litblindur

Faktapartur

Litblind fólk hava niðursetta litsjón, tvs. at tey síggja ikki mun á øllum litum. Summi litblind eru sokallað reyðblind, onnur grønblind. Hetta merkir, at tey hava trupult við at skyna á reyðum og grønum liti. Summi kunnu eisini vera blá/gulblind og í heilt sjaldsomum førum kunnu fólk vera púra litblind. 8% av øllum monnum eru litblindir, meðan bert 0,3% av øllum kvinnum eru tað.

Litblindni eru ofta arvaligt, og neurologurin og rithøvundurin Oliver Sacks hevur kannað tey, sum eru púra litblind á Kyrrahavsoynni Pingelap, har 6% av fólkinum eru púra litblind. Hetta sama sjaldsama fyribrigdið vísti seg eisini á oynni Fur í Límfjørðinum. Orsøkin sigst verða inngiftur.

Á netinum www.sundhedsguiden.dk , kunnu tit síggja eina talvu (ishihara), har tað ber til at kanna litblindni við at vita, um tit síggja tølini á myndunum. Um onkur er, sum hevur trupulleikar við hesum, ber til at fara til eygnalækna at fáa staðfest litblindni. Í dag hevur hetta so at siga ongan týdning, tí tú kanst hava nærum øll arbeiði, hóast tú ert litblindur. Undantikin eru tó flogskiparar og skipsførarar, sum ikki kunnu vera litblindir.



Hin týski rithøvundurin og heimspekingurin Johann Wolfgang von Goethe er kendur fyri sína litlæru. Hann legði til merkis, at í einum heilt hvítum rúmi, har hann hugdi at vegginum ígjøgnum eina prismu, varð tann hvíti veggurin verandi hvítur, og at litirnir vístu seg, har ljós og myrkur møttust – við vindeygasprossan. Goethe kom til ta niðurstøðu, at eitt mark má verða millum ljós og myrkur fyri at litirnir gerast veruleiki. Meiri kann lesast um litlæruna hjá Goethe t.d. á Wikipedia.

Bókalisti

Laurence Anholt: *Sámal og sólblómurnar* (Nýlendi 1997)
Bjørn Sortland: *Reytt, blátt og eitt sindur av gulum* (BFL 2000)
Sangir um litir í náttúruni:
Jens Dam Jacobsen: *Dýrd á vík og vág*
Martin Joensen: *Lítli mín, í nátt*
Hans Andrias Djurhuus: *Meg minnist eina mynd*

Arbeiðsbókin


Tekstaslag: *teknirød.*

Til uppgávu **2** í arbeiðsbókini ber til at lata næmingarnar blanda litirnar sjálvi og kanska royna aðrar litblandingar enn tær, sum nevndar eru í arbeiðsbókini. Tað er best at fara í evningarhølið og brúka svintu, tá tey gera hesar royndirnar.

Krossorðagátan er løtt at loysa við tað, at orðini eru tilskilað,

Uppgáva **5** leggur upp til, at næmingarnir sjálvir gera taluna til litirnar. Teir kunnu brúka tekst úr lesibókini, ella teir lata litirnar finna upp á okkurt annað at siga.

Svarlisti til arbeiðsbók



Hugskot Lurta eftir Vivaldi.

Umrøðuevni

- Greið næmingunum frá um endarím
- Tosa um at blanda litir
- Tosa um yndislitir hjá hvørjum einstøkum. Hvørjir litir eru í kamari tínum. Hvønn lit hevur bilur tykkara, hús o.s.v.
- Tosa um litir í samband við brúdleyp og jarðarferðir
- Tosa um mótalitir
- Heitir litir og kaldir litir
- Tosa um blómur og árstíðirnar
- Tosa um mánaðirnar í árinum
- Myndamál / myndatala
- Vikudagalitir

Faktapartur

Ebba Munk Pedersen er dani.

Helgi í Brekkunum er føddur í Hósvík 30. januar 1950 og er útbúgvin lærari. Helgi arbeiddi sum lærari frá 1976 til 1995, men er nú arbeiðsmaður.

Hann hevur saman við øðrum givið út bøkur til skúlabrúks.



Bókalisti


Arbeiðsbók

Tekstaslag: *sangur*.

Til uppgávu **2** kann tað vera trupult at finna orð, sum hava trý eins hjáljóð lið um lið. Eitt hugskot kann vera at lata børnini sjálv royna at finna orðini, áðrenn lærarin kemur við loysnum. Børnini kunnu fáa tveir dagar til at finna orð heima við at hyggja í t.d. bøkur, bløð og annan tekst.

Tá børnini hava verið ígjøgnum uppgávuna, fara tey óiva at geva tí gætur framyvir, og tey fara at finna fleiri. Tað kann vera eitt spæl, sum kann spælast, tá tað stingur seg upp.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

IIIlýsi í november

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 36

1 Set rætt orð inn

Eg liti ljósið blátt,
liti sól á mína gátt.
Eydnuvón mítt hjarta floymir,
og eg vetrarmyrkrið gloymi.
Hóast ódn, um vár eg droymi.
Eg liti ljósið blátt.

Eg liti ljósið gult.
Firvaldssólin flýgur dult,
setir seg á hendur mínar.
Tungir, vátir dagar dvína.
Mai nú kvøður vísu sína.
Eg liti ljósið gult.

2 Finnið orð, sum hava trý eins hjáljóð lið um lið

illlýsi
gulllaksur
plussstykki
gasssøla
fimmmannafar
bussskýli

3 Finn orð í sanginum, sum ríma við hesi

blátt	gátt
floymir	gloymi / droymi
gult	dult
mínar	dvína / sína
reytt	deytt
baldursbráum	summardáum
grønt	fløskugrønt
sígur	býður / lýgur
hvítt	títt
melónir	krónur / tónar
bjart	svart
gera	beri / verður

4 Finn samansett orð og skriva tey í skriviheftið

Dømi:
eydnuvón
vetrarmyrkur

30

31

Hugskot

Ætlanin við hesi uppgávuni er at tosa um at skriva og senda brøv og kort sjálvi. Tað ber til at gera kortið heilt øðrvísi, t.d. sjálvi at tekna skap at líma á kortið ella kanska finna á netinum ella úr bløðum aðrar myndir, sum eru egnaðar at líma á.


Umrøðuevni

- Samanbera við teldubrøv
- Tosa um at gleða onnur
- at senda sms
- Jólakort

Faktapartur

Bókalisti

Arbeiðsbók


Góði abbi,
Liga tillukku við degnum
ynskja
Hervør og Høgni

Hugskot

Umrøðuevni

- Hyggja at myndunum og tosa um tær
- Tosa um trøll, vættrar og ódjór
- Tosa um pátrúgv
- Tosa um klæði gjørd úr ull og um at tøva
- Greið frá muninum á sokkum og hosum
- Tosa um klæði til ymisk høvi – køld og heit klæði, og um at klæða seg eftir umstøðunum
- Hvussu vaskaðu fólk fyrr – vaskibretti – vaskaðu hárið í landi
- Vaskievni í dag og dálkingin, ið stendst av hesum – áirnar sørar fyri lív
- Føroysk klæði

Faktapartur

Pátrúgv er trúgv á yvirnatúrligar máttir, ið ikki samsvarar kristnari trúgv.

Vættur er yvirnatúrlig lítil manngóð vera, ið heldur til nær menniskjum ella í náttúruni. Vættrar búðu í kjallarum og fjósum; “eg stoyti heitt” varð sagt til at ávara vættrarnar, tá ið fólk stoyttu løgin av døgurðapottinum út í tún; allar Guds vættrar, varðið tykkum! (sagt tá ið fólk stoyttu løg el. ósku í ánna).

Trøll er stór og sterk og andskræmiliga ljót mannlík vera við hala, vandamikil, men býtt og góðvarin. Ofta taka trøll góða manna børn, tann góðvarni kemur ofta í vald hins illa.



Hosa er langleggjað fótarplagg (til mannfólk), einar hosur, tvinnar hosur; (tilt.) (tað gongur) sum fótur í hosu. Samb. pulshosur / hálvhosur.

Sokkur er ullint fótarplagg til konufólk, einir sokkar; tvinnir sokkar.

Vaskibretti er ruflut bretti til at vaska klæði á, vaskifjøl.

Land Fyrr høvdu fólk ikki so nógv vaskievni sum nú, og tí varð land/piss goymt, so tað kundi brúkast at vaska hárið í.

Bókalisti Rakel Helmsdal: *NEI! segði Lítla skrímsl* (BFL 2004)
Stór skrímsl gráta ikki (BFL 2006)
Myrkaskrímsl (BFL 2007)

Arbeiðsbókin Tekstaslag: *tekstur.*

Uppgáva **2** gongur út uppá at seta í bókstavarað, legg til merkis, at fleiri orð eru sum byrja við sama bókstavi.

Uppgávurnar **3** og **5** byggja undir rættskriving. Næmingarnir verða varugir við stavilsini og sjálvljóðini, og tað hjálpir teimum at stava rætt.

Svarlisti til arbeiðsbók

a á b d ð e f g h i í j k l m n o ó p r s t u ú v y ý æ ø ei ey oy

Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Ódjórið í vaskimaskinuni

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 38-41

Vár greiðir frá tí grøna ódjórinum við tí risastóra munninum.

1 Set rætt orð inn

„Tað hevur eingi bein, men langar armar," sigur Vár.

„Hvussu kann tað so stjala sokkar av snórinum?" spyr Páll. „Tað kann ikki ganga, um tað ikki hevur bein."

2 Set í bókstavarað

pella	hansara
passar	abbi
pápi	at
pylsa	át
halda	ódjór
hann	sokkar

abbi	ódjór	
at	passar	
át	pápi	
halda	pella	
hann	pylsa	
hansara	sokkar	

3 **Orð at stava** (Set kross við orðið, tá ið tú dugir at stava tað)

	Stavilsir	Sjálvljóðini	Skriva orðið
☒ **bangin**	2	a-i	bangin
☒ **hjá**	1	á	hjá
☒ **flúgva**	2	ú-a	flúgva
☒ **langar**	2	a-a	langar
☒ **altíð**	2	a-í	altíð
☒ **klæðini**	3	æ-i-i	klæðini

32

4 Svara spurningunum

Hvussu sær ódjórið í vaskimaskinuni út? Ódjórið er grønt og hevur risastóran munn. Tað hevur eingi bein, men langar armar, og tað dugir at flúgva.

Hvønn lit hevur tað? Ódjórið er grønt

Hvat etur tað? Ódjórið etur sokkar

Abbin fortaldi Vár um eitt ódjór. Hvar búði tað? Ódjórið, sum abbin fortaldi um, búði í køliskápinum.

Hvat át ódjórið, sum abbin fortaldi um? Ódjórið í køliskápinum át altíð tey seinastu eggini og ta seinastu pylsuna.

5 **Hvussu nógv sjálvljóð finnur tú? Set ein prikk undir hvørt sjálvljóð, tel tey og skriva rætt svar í puntin**

- Longu armarnir á ódjórinum rukku runt um allan kjallaran 19
- „Eg haldi, tú skalt fara í song nú," sigur pápin 14
- „Skulu vit renna upp í baðirúmið?" 11
- So renna báðir upp á loftið 9
- Baðirúmið er við síðuna av kamarinum hjá Vár 16
- Stutt eftir liggur Páll í songini 10

Tilsamans eru 79 sjálvljóð

33

Hugskot

Tit kunnu geva søgunum stjørnur, t.d. 5 stjørnur fyri heilt góð o.s.fr.

Umrøðuevni

- Grønland
- Ross
- Fótbóltur og fótbóltsskúlar
- Happing

Faktapartur

Grønland er heimsins størsta oyggj. Eins og Føroyar er Grønland ein sjálvstýrandi partur av danska kongaríkinum og fekk í 1978 heimastýrislóg. Høvuðsstaðurin í grønlandi eitur Nuuk fyrr Godthåb.

Bókalisti

Arbeiðsbókin

Uppgáva **2** er mállæruuppgáva, har næmingarnir skulu býta orð í sagnorð og navnorð. Tú kanst aftur læra næmingin at kenna navnorð við at seta *ein* ella *eitt* frammanfyri, tosa um hvussu nógv navnorð eru at finna uttanfyri.

Sagnorð kennir tú við at seta *at* ella *eg* frammanfyri t.d. *at hoppa* ella *eg hoppi*. Næmingarnir kunnu gera onkra rørslu sum vísir eitt sagnorð, t.d. renna, skriva, lesa o.s.fr., so skulu hini gita sagnorðið.


Í uppgávu **5** kann nertast eitt sindur við skrivisøguna. Dømi um ymisk skriviamboð kann verða: Fjaðurpennur, griffil, fyllipennur, blýantur, kúlupennur, krit til nútímans útgerð, har teldan er høvuðsskriviamboðið. Tosað kann eisini verða um ymiskt at skriva á t.d. papýrus.

Ein fjøðurpennur kann eftirgerast úr eini gásafjøður

Griffil var eitt skriviamboð gjørt úr grafitti, sum varð brúkt at skriva á talvur við. Hvørt barnið hevði sína talvu.

Papýrus er eitt av heimsins elstu pappírum, sum varð gjørt í Egyptalandi fyri 4000 árum síðani. Papýrus varð gjørt úr plantuni *Cyperus Papyrus*. Uppskriftin upp á hetta tilfarið var so loynilig, at hon varð ikki skrivað niður, men borin munn av munni gjøgnum ættarliðini. Papýrus plantan varð roknað sum heilag, blóman sjálv var ímyndin av sólini, meðan hin tríhyrnti stelkurin var egyptiska teknið fyri ævinleika.

Svarlisti til arbeiðsbók



Orðatøk og gátur • síða 44-45

Hugskot

Les hesar báðar síðurnar í skúlanum saman við næmingunum og tosið saman um innihaldið. Lat børninni bera gáturnar upp heima.

Umrøðuevni

- Greið næmingunum frá, hvat orðatøk og gátur eru.
- Tosa um at ynskja ilt/gott yvir onnur.
- Tosa um, at øll hava onkran góðan eginleika – duga okkurt.
- At hjálpa øðrum.
- Hvussu stuttleikaðu tey sær fyrr í mun til í dag.

Faktapartur

Eitt orðatak er ofta ein stuttur setningur, sum hevur eina greiða niðurstøðu um okkurt ávíst evni.

Ein gáta er ein stutt søga, sum endar við einum spurningi. Viðhvørt eru gátur settar saman upp á rím. Tað hevur altíð verið vanligt í Føroyum at bera upp gátur, men nógvar føroyskar gátur eru um amboð og lutir, sum fólk í dag lítið kenna til, so tí er trupult at gita tær.

Dømi um eldri gátur:

– Klórast og bítast um dagin, hálsfevnast um náttina?
karðar

– Etur við eyganum, spýr við liðini
kvørn

Ein yngri gáta:

– Hvat hendi í 1961, sum ikki fer at henda aftur fyrrenn í 6009? (Árstalið 1961 kann vendast á høvdið og gevur sama úrslit)

Bókalisti


Arbeiðsbókin

Her er ein rebusgáta við fyri fyrstu ferð. Næmingarnir og lærari kunnu loysa hana í felag, men kanska onkur av næmingunum klárar hana einsamallur.

Uppgáva **3** er um orð, ið skulu skrivast við stórum. Tosið her um nøvn á fólki, londum og bygdum. Her er høvi at tryggja sær, at næmingarnir kenna allar teir stóru bókstavirnar.

Stjørnuuppgávan við orðatøkunum kann eisini loysast soleiðis, at næmingarnir skriva orðatøkini á teldu og so prýða tey á ymiskan hátt.

Svarlisti til arbeiðsbók



Hugskot

Lurtað verður eftir fløguni. Síðan fáa næmingarnir søguna fyri at lesa heima. Rátt verður til at býta søguna upp, so heimasetningurin ikki verður alt ov langur.


Umrøðuevni

- Er munur á gentuspølum og dreingjaspølum. Hví eru eingir dreingir við til náttkjólagildið?
- At senda sms. Eru sms-boð við til at forða fyri rættari stavseting ella stuðlar tað undir at fáa børnini at skriva?
- Tosa um munin á at arga og happa. Dreingirnir arga genturnar? Er tað rætt? Hví munnu teir arga tær? Kundi hetta kvøldið verið øðrvísi, um dreingirnir vóru við frá byrjan?

Faktapartur

Sms stendur fyri Short Message Service (tænasta fyri stuttum boðum)

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Náttkjólagildið

1 Set rætt orð inn

Hervør er so spent til í kvøld, tí hon og hinar genturnar í flokkinum skulu hava náttkjólagildi heima hjá sær.

Høgni er eitt sindur keddur, tí hann ikki sleppur við.

„Tað er bara fyri gentur," sigur Hervør.

„Tú kanst biðja Virgar koma at sova hjá tær, so kunnu tit eisini hugna tykkum," sigur pápin við Høgna.

„Ja, tað er fint," sigur Høgni. „Eg sendi honum eitt sms beinanvegin."

38

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 46-49

2 Svara spurningunum. Skriva heilar setningar í skriviheftið

1 Hví er Hervør so spent í kvøld?
2 Hví er Høgni keddur?
3 Hvør kemur at sova hjá Høgna?
4 Hvussu nógv ár eru Hervør og Høgni?
5 Hvat fingu tey í føðingardagsgávu?
6 Á reglu 19 og 20 á síðu 46 greiðir Hervør frá, hvat tær gera. Hvat sigur hon?
7 Hvørjum skal Virgar vera í, tá ið hann kemur, sigur Høgni?
8 Hvat baka Hervør og Høgni saman við foreldrunum?
9 Hvat hava dreingirnir við inn í kamarið?
10 Hvør hevur stongt hurðina, sum er ímillum kømurini hjá Hervør og Høgna?

3 Hvørji av hesum orðunum skulu skrivast við stórum? Skriva tey

sofía, bygd, genta, niels pauli, einar, skáp, pennur, telefon, vestmanna, kvívík, mynd, kona, sjúrður

Sofía, Niels Pauli, Einar, Vestmanna, Kvívík, Sjúrður

39

Bókalisti


Marie Thøger: *Tann illavorðni andin*
Arnbjørn Ó. Dalsgarð: *Toftin hinumegin* (í *Svartideyði og aðrar spøkilsissøgur*, BFL, 2006)
Edmund Joensen: *Boð* (í *Svartideyði og aðrar spøkilsissøgur*, BFL, 2006)
Francesca Simon: *Herviligi Henry í spøkilsishúsinum* (BFL, 2008)

Arbeiðsbókin

Uppgáva **5** er málæruuppgáva, har navnorð skulu skrivast í fleirtali. Her verða dømi tikin úr flokshølinum, t.d. kunnu næmingarnir sjálvir brúkast, ein genta – fleiri gentur, ein drongur – fleiri dreingir, ein flokkur – fleiri flokkar o.s.fr.

Uppgáva **7** kann verða grundarlagið undir at tosa um sms-mál. Hvussu stava børnini? Hvørjar serligar styttingar brúka tey? Lærarin eigur at vera opin og lurta eftir og so í felag við næmingarnar tosa um munin á sms-máli og rættari stavseting.

Svarlisti til arbeiðsbók



Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 46-49

4 Být hesi orðini sundur í navnorð og sagnorð

lykil, spyrja, síggja, hol, lurta, skríggja, hoyra, gildi, lás, renna, søga, taka, spøkilsi, gólv, rópa, tíð, spøkja, fortelja, hurð, telda

navnorð	sagnorð
lykil	spyrja
hol	síggja
gildi	lurta
lás	skríggja
søga	hoyra
spøkilsi	renna
gólv	taka
tíð	rópa
hurð	spøkja
telda	fortelja

5 Skriva navnorðini í fleirtali

Fleirtal
lyklar
hol
gildi (r)
lás
søgur
spøkilsi (r)
gólv
tíðir
hurðar
teldur

6 Skriva sagnorðini í tátíð

í gjár	spurdi	hann/hon
í gjár	sá	hann/hon
í gjár	lurtaði	hann/hon
í gjár	skríggjaði	hann/hon
í gjár	hoyrdi	hann/hon
í gjár	rann	hann/hon
í gjár	tók	hann/hon
í gjár	rópti	hann/hon
í gjár	spøkti	hann/hon
í gjár	fortaldi	hann/hon

7 Skriva sms

Hervør sendir sms til genturnar. Hvat skrivar hon?

Høgni sendir sms til Virgar. Hvat skrivar hann?

Tú kanst senda eitt sms til onkran vin. Skriva tað her

8 Orð at stava (Set kross við orðið, tá ið tú dugir at stava tað)

	Stavilsir	Sjálvljóðini	Skriva orðið
☒ trýr	1	ý	trýr
☒ nátt	1	á	nátt
☒ leggja	2	e-a	leggja
☒ genturnar	3	e-u-a	genturnar
☒ niður	2	i-u	niður
☒ meðan	2	e-a	meðan

9 Skriva tína egnu spøkilsissøgu í skriviheftið

Byrjan
Einaferð var tað ...
Ein dagin fór ...
Sjálv søgan
Fortel um veðrið, staðið, persónarnar
Endi
Hvussu endaði søgan?
Lærdu tey nakað av henni?

40

41

Grønir menn frá Pluto • síða 50-51

Hugskot

Latið børnini fylgja við í tekstinum, meðan tey lurta eftir fløguni og syngja við.

Umrøðuevni

- Tosa um myndirnar. Rúmdarfólk við antennum á høvdinum og løgnari útsjónd
- Flúgvandi tallerkar
- Tosa um rúmdarfør, flogfør og tyrlur
- Tosa um koyrikort
- Næmingarnir siga frá hvørjar sangir/søgur teir kenna um mána, stjørnur og sól

Faktapartur

- Steintór Rasmussen er føddur í Klaksvík í 1960 og er lærari. Steintór er kendur tónleikari, og hevur føroyskað og yrkt nógvar sangir.



- Lærarin kann eisini lesa um Steintór á s. 402 í bókini *Føroyskir fólkaskúlalærarar.*
- Aðrir sangir: Far lítli útum eina løtu og spæl (Finnbogi Ísakson)
- Góða mamma kom nú og set her hjá mær (Hans Andreas Djurhuus)

Bókalisti

Arbeiðsbókin Hjálp næminginum at skriva eina søgu um rúmdina. Minst til at tosa um byrjan, innihald og enda.



Hugskot

Lurtað verður eftir fløguni. Næmgarnir fáa søguna fyri at lesa heima – hon kann býtast í tvey, so heimasetningurin ikki verður ov langur.


Umrøðuevni

- At koma til skaða. Hvønn kenna tey, sum eru komin til skaða?
- Hava tey verið úti fyri, at nakar er komin til skaða í skúlanum?
- Fyrstahjálp.
- Tey hyggja í sjónvarpið í søguni. Hvat dámar tær besta at hyggja at í sjónvarpinum? Ger t.d. eina sjónvarpsskrá, sum tú ynskir, hon skal síggja út.

Faktapartur



- Merkið, sum er grønt við hvítum krossi, er altjóða merkið fyri fyrstuhjálp.
- Star of Life er ein blá stjørna við seks tindum. Í stjørnuni sæst Æskulapstavurin. Runt um í heiminum verður hetta teknið brúkt sum tekin fyri ambulansu-tænastuna.
- Æskulapstavurin er uppkallaður eftir læknagudinum, sum á griskum eitur Asklepios og á latíni Aesculapius. Hetta er ein stavur, sum ein slanga ringir seg rundan um, og er hetta eitt tekin fyri læknavísund. Slangan er knýtt at læknagudinum, tí hildið varð, at slangan fekk ungdóm sín aftur, tá ið hon skifti ham.





Bókalisti Hans A. Djurhuus: *Á sjúkrahúsi* (í Søgur, BFL, 1983)

Arbeiðsbókin Í uppgávu **4** verður tosað um at senda boð, tá ið onkur kemur til skaða. Minst til at læra næmingarnar at siga eitt – eitt – tvey og ikki hundrað og tólv, tí misskiljingar kunnu standast av hesum, tá skjótt skal berast at.

Svarlisti til arbeiðsbók


a á b d ð e f g h i í j k l m n o ó p r s t u ú v y ý æ ø ei ey oy

Tekstur
Søga
Ævintýr
Sagn
Yrking
Sangur
Teknirað
Faktatekstur
Annað

Una fær hol á høvdið

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 52-53

1 Finn veg gjøgnum villiniborgina



Loysnin H O L Á H Ø V D I Ð



2 Set í bókstavarað

dreingir	lækni
gentur	abbi
skúlagarður	handklæði
trappur	børn
fótur	sár

abbi	handklæði
børn	lækni
dreingir	sár
fótur	skúlagarður
gentur	trappur

44

3 Hygg eftir myndunum á síðu 52 og 53

Set runding um tað rætta	Ja	Nei
Tað eru fýra stig í trappunum	R	J
Tað eru fimm stig í trappunum	K	S
Una er í reyðum buksum	P	T
Una er í bláum buksum	A	V
Ein drongur hevur nummar níggju á bakinum	Ø	A
Ein drongur hevur nummar tíggju á bakinum	N	Ø
Bilurin hjá abba er gulur	F	S
Bilurin hjá abba er reyður	N	P
Una hevur bindi um armin	Ú	D
Una hevur bindi um høvdið	V	B
Una er í hvítum jakka	N	U
Una er í grønum jakka	Á	M

JA gevur R A N N V Á

4 Hvar ringir tú, um tú skalt hava bráðfeingis hjálp?

1 - 1 - 2

5 Kennir tú nakran, sum er komin til skaða?
Skriva eina søgu í skriviheftið um tað ella finn upp á eina søgu.

45

Hugskot

Tey kunnu fáa síðu 54 fyri at lesa uppá heima og tosa heima um tíð frammanfyri telduni og sjónvarpinum. Aldursmark er eisini upplagt at tosa um í hesum sambandi

Umrøðuevni

- Hvat er tað nýggjasta í telduheimi okkara?
- Karaoke
- Bowla og onnur ítróttarspøl á skýggjanum
  Hvussu eita tey?
- Næmingar greiða frá sínum frítíðarítrivum
- Lærarin ger ein topp 10 lista yvir frítíðarítriv
- Næmingar greiða frá útbúgvingum hjá næstringum
- Næmingar greiða frá, hvat teir ætla at gera,
  tá ið teir verða vaksnir
- Aldursmark

Faktapartur

Fyrstu teldurnar vórðu bygdar í Týsklandi, Englandi og USA millum 1940 og 1950. Tær vóru sera stórar, men tey seinastu árini hevur menningin gingið sera skjótt. Í dag eru teldur eisini rættiliga bíligar í mun til, hvat tær kostaðu t.d. fyri bert fáum árum síðani.

Bókalisti



Hugskot

Lurtað verður eftir sanginum í skúlanum, kanska fleiri ferðir, og næmingarnir kunnu syngja við.

Umrøðuevni

- Víst verður á kortinum, hvar Grønland er, og hvussu stórt landið er í mun til Føroyar
- Tosa um tannhvalir og barduhvalir
- Gera eina myndatalvu við øllum djórunum í sanginum
- Matur úr sjónum
- Kryddarí
- Grindadráp
- Hvalaveiða
- Djóraverndarfelagsskapir
- Hvør av øðrum liva má – Animal Planet
- Fablarnir hjá Esop

Faktapartur

Tannhvalir eru hvalir, sum hava tenn. Dømi um tannhvalir eru: grindahvalur og mastrahvalur/bóghvítuhvalur, avgustur og nísa.

Barduhvalir eru hvalir, sum ikki hava tenn, men bardur. Hetta eru trevsutar hornplátur, sum standa í røðum í kjaftinum. Tá ið so hvalurin svimur við opnum kjafti, kemur æti inn í kjaftin og verður hangandi í trevsunum, tá ið hann sílar sjógvin út aftur. Dømi um barduhval er heimsins største djór, bláhvalurin.

Bókalisti


Brynhild Andreassen: *Kuffi* (BFL, 2001)
Bjarni Joensen: *Summarseiðurin* (úr *Sig mær eina søgu 1*, BFL, 1971)

Arbeiðsbókin

Tekstaslag: *sangur*.

Til uppgávu **3** eigur lærarin at hjálpa næmingunum at finna hvalirnar. Tað ber eisini til at hava samarbeiði við læraran í heimstaðarlæru um hetta evnið.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Stórhvalagildið

1 Skriva øll dýrini, tit finna í ørindi 1-4

stórhvalur | hemari
mureldur | krossfiskur
grindahvalur | rognkelsi
brondingur | tindasøta

2 Set runding um tað rætta

5. ørindi	Ein brugda og ein ...	kalvi (K)	roysningur (B)	kópur (S)
6. ørindi	brugdan hon fekk ...	størst (T)	minst (V)	alramest (Ø)
7. ørindi	Teir sungu Sáru ...	eina ferð (G)	tvær ferðir (A)	fýra ferðir (K)
8. ørindi	... og tugdi ...	bomm (O)	taramellur (S)	lakress (P)
9. ørindi	krabbagággan gekk á ...	tá (L)	hondunum (M)	beinunum (O)
10. ørindi	... so segði nísan ...	sáttliga (I)	harðliga (R)	stillisliga (A)
11. ørindi	... og svølgir eina ...	flugu (U)	fliðu (F)	øðu (N)
12. ørindi	... og gjørdi so ein ...	bil (T)	vørr (I)	penn (H)

LOYSN: B Ø K S L I N I

46

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 55-57

3 Leita á síðu 25 í bókini *Villini súgdjór í Útnorðri* og finn nøvnini á hesum hvalum. Skriva hvussu teir eita.

royður
nebbafiskur
seiðhvalur
gráhvalur
sildreki
kúluboka
grønlandsslættiboka
slættiboka
avgustur

47

Hugskot


Skotið verður upp at lærari og næmingar í felag lurta eftir fløguni og tosa um søguna. Næmingarnir fáa søguna fyri at lesa heima, foreldrini kunnu fáa boð um at tosa við barnið um happing út frá hesi søguni. Foreldrini kunnu melda aftur til læraran, um tey halda, at barn teirra hevur trupulleikar í skúlanum. Síðan kann verða arbeitt við einum felags projekti á henda hátt:

- Allir næmingarnir í flokkinum verða settir í runding, lærarin er eisini við í rundinginum. Ein annar lærari er við sum eygleiðari og skrivar niður, hvat hin einstaki næmingurin sigur.
- Hvør næmingur sigur so, hvussu tað er at vera næmingur í júst hesum flokkinum beint nú. Øll hini lurta. Lærarin kann hjálpa næmingunum í gongd, men royn at avmarka spurnarorð, sum t.d. hví, hvat, hvør o.s.fr. Brúka ístaðin: fortel um, greið frá.



- Aftan á skal hvør næmingur tekna eitt djór. Hetta djórið verður límað á kartong og síðan klipt út.
- Farið verður aftur í runding, har hvør næmingur fortelur um eginleikarnar hjá hesum dýrinum. Hvar tað býr, um tað hevur foreldur, systkin, vinir o.a.
- Síðan verður eitt stórt grátt kartong lagt á gólvið í skúlastovuni. Allir næmingarnir sita rundan um, og so fer ein og ein næmingur og leggur sítt djór, har hann heldur, tað skal verða.
- Tá ið øll djórini eru komin at liggja har ætlanin er, kann hvør næmingur einaferð aftrat leggja sítt djór har hann vil, og samstundis hevur hann loyvi at flyta djórini hjá hinum í flokkinum.
- Triðju ferð djórið verður lagt á tað staðið, næmingurin ynskir, verður tað límað fast.

Svarlisti til arbeiðsbók



- Lærarin leggur nú til merkis, hvørji djór halda saman, um nakað djór er einsamalt í einum horni, um nakað djór fyllir meiri enn hini o.s.fr.
- Nú verður tosað um, at har er so ringt hjá djórunum at liva, tí eingi trø, vøtn og annað er. Tí fær hvør næmingur 3 minuttir at tekna á pappírið, tað sum hann heldur, fer at hjálpa djórunum at hava eitt gott lív. Einir 4 næmingar kunnu tekna í senn, og fleiri rundur kunnu takast til næmingarnir eru nøgdir við myndina.
- Um nøkur djór hava gyrt seg inni einsamøll, kann verða tosað um at grava holur, byggja brýr og vegir, ið hvussu so er lata upp fyri samferðslu í millum djórini, tí tað er ómøguligt at liva einsamallur.
- Aftaná verður myndin hongd upp í flokkinum. Næmingarnir kunnu bjóða onkrum øðrum flokki ella foreldrunum at síggja myndina, og teir kunnu sjálvir greiða frá sínum djóri.

Umrøðuevni

Happing

Faktapartur

Orðið happing er á donskum mobning, sum kemur úr enska orðinum mobbing, sum aftur kemur úr orðinum mob (pøbel). Upprunamerkingin av orðinum var, at ein bólkur forfylgdi einum ávísum persóni, men í dag verður eisini tosað um happing, tá ið tað er ein persónur, sum er eftir einum øðrum, so talan er um illviljaða arging. Tann, sum verður happaður, verður ofta útsettur fyri, at onnur sláa, royta, spýta ella eisini verður viðkomandi útifrystur t.d. í flokshøpi ella eyknevndur.

Avleiðingin av álvarsamari happing kann verða, at viðkomandi fær sálarligt brek fyri lívið.

Bókalisti

Heini Hestoy:	*Regin og Sára*
Torvald Sund:	*Svim fyri lívinum*
Maria Gripe:	*Josefina*
	Hugo og Josefina
	Hugo
Ian Serailler:	*Silvurknívurin*
Michael Morpugo:	*Vinur ella fíggindi*
Karl Bruckner:	*Sadako vil liva*

Ruth Minsky Sender:	*Búrið*
	Til lívið
Lydia Didriksen:	*Hvør vil eiga myrkrið?* (BFL, 1998)
Madonna:	*Ensku rósurnar* (BFL, 2003)
Ilse M. Haugaard:	*Karl K – einligur sonur* (BFL 2005)
	Karl K undir sólini (BFL 2006)
	STROK nr. 2, 2007
	www.eg.fo

Arbeiðsbókin

Arbeiðsbókin leggur eisini upp til at arbeiða við evninum happing. Høvundarnir halda, at tað er alneyðugt at evnið verður viðgjørt væl, og at lærari, næmingar og foreldur taka evnið í stórum álvara.

Svarlisti til arbeiðsbók

4 Svara spurningunum við tínum egnu orðum

Hví er Einar so keddur, tá ið hann kemur heim úr skúlanum?

Hvat sigur mamman?

Hvat ætlar Pól at gera?

Hvønn ringja tey til?

Hvat hendir í skúlanum dagin eftir?

Hví fer Vár at gráta?

Hvør lóg skal hereftir vera lógin í 3. flokki?

Hvat heldur tú um tær avgerðir, sum 3. flokkur tekur?

Hevur tú nakað at leggja aftrat?

5 Hygg í orðalistan

Orðið í orðalistanum	Orðið aftaná
viss	vit
skrædna	skulu
ið	ikki
hann	happa
onkustaðni	onnur
tit	tí
tarvur	tá
vera	verða
tenn	tey
kavi	kedd

Skriva setningin Vit skulu ikki happa onnur, tí tá verða tey kedd



6 **Ein góður dagur í skúlanum**

Skriva í skriviheftið um ein dag, tú hevur upplivað, ella sum tú kundi hugsað tær at uppliva

Hugskot

Søgan kann býtast í tríggjar leksiur. Fyrst verður lurtað eftir fløguni, so tey fáa undanvitan, og síðan kunnu tey fyrst fáa síðu 62 og 63 fyri. So síðu 64 og 65 og til seinast síðu 66 og 67 fyri at lesa uppá heima.

Umrøðuevni

- Tosa um ævintýr
- Talið trý í ævintýrum
- Tosa um gand, huldufólk og risar
- Neyt stóðu í kjallaranum fyrr
- Neyt í fjósi – hestur í stalli – svín í stíggi – seyður í seyðahúsi/hoyggjhúsi
- Mjólkaúrdráttir og mjólk kontra sodavatn
- MBM
- Navari = borur = tvari
- Kollut neyt – neyt við hornum
- Tarvafiktan





Faktapartur

Til mitt í sekstiárunum var vanligt á bygd at hava kúgv í nærum hvørjum húsi. Mjólkin var sera gott ískoyti til matin. Vanligt var eisini at hava mjólkarúrdráttir til nátturða. Dømi um hetta kann vera: ketilostur, undirlagt, bollamjólk, smør, ostur, rómi, loypingur/rómastampur.

Ketilostur varð gjørdur soleiðis, at tá ið kúgvin hevði kálvað, var nakað av rámjólkini, tað er tann fyrsta mjólkin undan kúnni, eftir at hon hevur kálvað, latin út í heita mjólk. Summi høvdu heilt kanel í. Mjólkin leyp saman í kost og mysu, og hetta varð sopið.

Undirlagt er gjørd á sama hátt sum ketilostur, munurin er bara tann, at dropar av undirløgu og ikki rámjólk varð latin í mjólkina. Annars var hetta sopið.

Ostur var gjørdur á just sama hátt sum undirløga. Til ein vanligan ost vórðu vanliga brúktir 10 litrar av mjólk, sum vórðu lunkaðir og so varð ein súpuskeið av undirløgu latin í.

Tá ið mjólkin hevði skilt seg í kost og mysu, varð kosturin latin í ein ostakopp. Hetta var ein træformur við holum í, so mysan kundi renna frá.


Undirløgugras er blá blóma, sum er kjøtetandi.

Kveikamagi: Vinstur úr kálvi. Kveikamagin varð fyltur við mjólk, og tá ið hetta hevði staðið nakað, leyp tað saman – varð tjúkt. Kveikamagi varð brúktur sum undirløga.

Bókalisti

Í skýmingini
Grái steinur
Huldubókin
Timmi og Trina
Snøkil og Snáka
Snøkil og Snáka á vetri
Snøkil og Snáka í haganum

Svarlisti til arbeiðsbók



a á b d ð e f g h i í j k l m n o ó p r s t u ú v y ý æ ø ei ey oy

Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Kolla

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 62-67

1 Hygg at myndini á síðu 62. Hvussu nógv navnorð finnur tú? Skriva tey í skriviheftið

2 Hygg í orðalistan

Orðið í orðalistanum	Orðið aftaná
søtt	tað
eplagrýta	er
álur	álvarsamt
armar	at
arbeiði	arga
hugskot	huldufólk

Skriva setningin: tað er álvarsamt at arga huldufólk

3 Hvussu nógv sjálvljóð finnur tú? Set ein prikk undir hvørt sjálvljóð, tel tey og skriva rætt svar í puntin

- Hans og mamma hansara hava kúgv — 10
- Navnið á kúnni er Kolla — 8
- Huldukonan stjól kúnna — 7
- Kolla dugdi at ganda — 7
- Hans fann Kollu aftur — 6

Tilsamans eru 38 sjálvljóð

52

4 Set rætt orð inn

Hans finnur Kollu

Hesa ferð beljaði hon so hart, at hon mátti vera onkustaðni nær við, har hann var.
Hann hugdi rundan um seg, og at enda sá hann eina hurð, sum gekk inn í ein heyggj tætt við.
Hann skundaði sær at lata hurðina upp, og har stóð Kolla.
So skjótt sum til bar, loystu hann Kollu og slapp sær út við henni.
Ein stórur hestur stóð bundin har, men tað legði Hans einki í.

Tey rýma

Hann rann avstað við Kollu, so skjótt sum hann orkaði, fegin um at hava fingið hana aftur.
Men nú hoyrdi hann eitt gallróp.
Tað var ein huldugenta, ið rópti á mammu sína at spyrja, hvat ið hent var.

53



Undirløgugras

Undir tussafjøllum
Trøllalív
Tað stóra trøllið og tey smáu dýrini
Mundi tað vera trøllið
Gandakellingin Flumbra
Brúsajøkil
Trøllafía sigur frá
Spell at sólin kom upp (dias)
Kópakonan
Drekin og smáu vatntrøllini
Trumm trumm tralalei
Martin Joensen: *Drongurin og huldufólkini* (í *Klokkan ringir*, BFL, 1962)
Jakob Jakobsen: *4 ævintýr* (FSG, 2003)

Svarlisti til arbeiðsbók

5 Set runding um tað rætta

Huldukonan og huldugentan runnu ...	skjótari	kvikliga	spakuliga
	K	G	H
Kolla segði: "Tak eitt hár úr ... "	nøs míni	høvdi mínum	hala mínum
	A	Ó	O
Hárið gjørdist til ...	eitt vatn	ein foss	eina á
	D	B	L
Huldugentan fór heim eftir ...	veðrinum	hestinum	grísinum
	U	L	Ú
Hesturin drakk ...	mjólkina	vatnið	sodavatnið
	Æ	A	Ø

LOYSN

6 Být hesi orðini sundur í navnorð og sagnorð

fara, drekka, kúgv, kona, siga, drongur, ganga, hali, bál, finna, genta, maður, leita, taka

navnorð	sagnorð
kúgv	fara
kona	drekka
drongur	siga
hali	ganga
bál	finna
genta	leita
maður	taka

54

7 Hvørji av hesum orðunum verða skrivað við stórum?

kolla, leita, finna, hans, rituvík, drekka, hestur, jákup, eyðfinnur, hestur, hár, anna

Kolla
Hans
Rituvík
Jákup
Eyðfinnur
Anna

8 Hvat siga tær báðar?

9 Hvussu nógv orð á síðu 67 hava tveir bókstavir 38
Skriva teir í skriviheftið

55

Músavísa • síða 68-70

Hugskot

Lærari og næmingar lurta saman eftir sanginum og syngja við. Vit halda, at næmingarnir eru so mikið væl fyri at lesa nú, at tey kunnu hava sangin fyri at lesa heima. Næmingarnir læra at lesa tekst upp á bundnum máli.

Umrøðuevni

- Høgtíðir
- Jólagávur
- Jól fyrr og nú
- Hvat er eitt setepli
- Tosa um myndina ovast á s 69
- Tosa um myndina á s.68 – at sova á bóli
- Músafellur

Faktapartur

- Jon Gulak Jacobsen 1950 – 2006 lærari, Hvalba
  Lærarin kann eisini hyggja í bókina *Føroyskir fólkaskúlalærarar* á s. 186 og lesa meira um Jon Gulak
- Alf Prøysen 1914-1970. Norðmaður, gjørt nógvar fittar barnasangir, t.d. Mýrisóljuna á s. 150.




Bókalisti

Arbeiðsbókin

Her læra næmingarnir at gera hugarok. Hugarok er ein háttur at skipa tankar/hugskot. Tað vil siga, at fleiri fólk í felag hjálpa hvørt øðrum at koma við góðum hugskotum, sum síðan verða skipað við at høvuðsevnið verður sett í miðjuna, og tankar/hugskot um evnið verða sett rundanum.

Meira er at lesa um hugarok í lærarabókini til *Kom og skriva 1* hjá Lydiu Didriksen og Birgit Arge (FSG, 1996).

Svarlisti til arbeiðsbók



Hugskot

Jólatíðin er ofta ein øðrvísi og hugnalig tíð í skúlanum. Tí er ikki so nógv lesitilfar til hesar dagarnar. Sangurin kann syngjast og í arbeiðsbókini er uppskot um, hvussu farast kann fram.

Umrøðuevni

- Jól
- Jólasiðir í Føroyum
- Jólasiðir í útheiminum

Faktapartur

Í Norðurlondum hildu fólk heiðin jól, vetrarsólstøðu, fyri at hátíðarhalda at nú gekk aftur móti ljósari tíðum. Í dag halda flestu føroyingar kristin jól til at hátíðarhalda Jesu føðing.

Jólamaðurin. Hetta er ein uppfunnin persónur, sum gevur gávur til skikkilig børn á jólum. Jólamaðurin hevur ymisk nøvn í ymsum londum:

USA	Santa Claus
England	Father Christmas
Svøríki	Jultomten
Noreg	Julenissen
Italia	Babbo Natale
Týskland	Weihnachtsmann

Søgan um jólamannin verður hildin at stava frá einum turkiskum biskuppi, Santa Nicolai, sum gav teimum fátæku gávur. Hvussu jólamaðurin sá út og var ílatin, var eitt sindur ymiskt inntil 1931, tá ið Coca Cola gjørdi eina lýsing, sum vísti jólamannin sum ein tjúkkan mann við síðum, hvítum skeggi, í reyðum frakka við hvítum belti um miðjuna.

Jólatræ Í 1500 og 1600 talinum byrjaðu týskir handverkarar at hava eina jólaveitslu, har teir settu eitt granntræ upp og prýddu tað. Børnini fingu tær gávurnar, sum hingu á trænum. Í 1605 skrivar ein ókendur, at í Suðurtýsklandi var vanligt at seta eitt granntræ upp inni i stovuni, prýða tað við pappírsrósum, súreplum og øðrum. Hesin siðurin breiddi seg um alt landið, og í Danmark verður hildið at fyrsta jólatræið var pyntað í 1808. Siðurin er komin til Føroya úr Danmark.



Nikolai Frederik Severin Grundtvig (1783–1872) var danskur rithøvundur, yrkjari og teologur. Hann er tann, sum hevur yrkt flestu sálmarnar í donsku sálmabókini. Tað var eisini Gruntdvig, sum byrjaði háskúlarørsluna í Danmark

Jacob (Jákup) Dahl (1878–1944) var próstur í Føroyum. Jákup Dahl arbeiddi fyri at fáa føroyskt sum kirkjumál ístaðin fyri danskt, sum vanligt var at nýta tá. Jákup Dahl umsetti Bíbliuna úr hebræiskum og griskum til føroyskt. Nýggja Testamenti var liðugt umsett í 1937, Gamla Testamenti var ikki liðugt umsett, tá ið J. Dahl doyði, men Kristian Osvald Viderø gjørdi tað liðugt og var hendan umsetingin liðug í 1961.

Í 1949 kom fyrsta bíbliutýðingin til føroyskt út. Tað var ***Victor Danielsen***, (1894–1961), sum hoyrdi til Brøðrasamkomuna, sum týddi hana.

Bókalisti

Mauri Kunnas: *Jólamaðurin*, ein bók um jólamannin og hjálparar hansara, sum búgva undir Oyrnafjalli
Michelsen, Sólrún: *Jólagávur*
Matthews, Derek: *Stuttlig jól*
Mín jólabók (BFL gevur út á hvørjum ári)

Arbeiðsbókin

Í arbeiðsbókini eru hugskot til ymsan jólahugna



Hugskot

So verður byrjað aftur aftan á jól, og nógv er at tosa um. Hvat tey hava gjørt á jólum og nýggjárinum. Tosað verður um teirra jóla og nýggjárssiðir.

Lurtað verður eftir fløguni, og síðani kann teksturin verða lisin, antin við at tey skiftast at lesa hart ella lærari og næmingar lesa saman.

Umrøðuevni

- Trygd á nýggjárinum – hvat síggja tit á myndini?
- Nýggjár og nýggjárssiðir.

Faktapartur

At hitt gamla árið er umliðið, og tað nýggja byrjar, verður í nógvum londum hátíðarhildið á ymsan hátt. Á midnátt verður ringt við kirkjuklokkuni til at ringja hitt nýggja árið inn. Fyrr var vanligt í Føroyum at fara við klokkaranum í kirkjutornið og sláa á klokkuna við ymsum, sum larmaði illa. Í dag verður nógv fýrverk skotið, og larmurin og ljósini frá fýrverkinum, verður hildin at hava sín uppruna í, at í løtuni tá ið gamla árið rennur út og nýggja kemur, kann alt ilt henda, og tí ræður um at larma sum mest til at styggja burtur alt tað illa.

Í Skotlandi er vanligt at sópa øll húsini gamlaárskvøld, byrjað verður í erva og runt í øllum rúmunum. Hetta skal visa, at hitt gamla verður sópað burtur og rúm verður gjørt fyri tí nýggja.


Í 1582 varð hin gregorianski kalendarin innførdur um meginpartin av vesturheiminum og eftir honum er 1. januar hin borgarligi nýggjársdagurin. Kirkjuligi nýggjársdagurin er fyrsta sunnudag í advent. Í 1622 viðtók eisini katólska kirkjan, at nýggjársdagur var 1. januar, áðrenn tað hevði hann verið 25. marts, Boðanardag Mariu.

Bókalisti *Jólaboð 2008*

Arbeiðsbók Tekstaslag: *tekstur*.

Næmingarnir kenna aftur allar arbeiðsuppgávurnar á hesum síðunum.

Svarlisti til arbeiðsbók



Minst til at biðja faðirvár • síða 78



Hugskot

Lurtað kann verða eftir fløguni, og síðan kann sangurin syngjast. Les faðirvár upp fyri børnunum á ymiskum málum.

Umrøðuevni

- Kvøldarsangir
- Faðirvár
- At signa seg

Faktapartur

Í Føroyum hevur verið vanligt í øldir at biðja faðirvár um morgunin, áðrenn farið varð upp, og um kvøldið, tá ið farið varð til songar. Eisini var vanligt at signa seg, og vanligt var at signa børn, áðrenn tey fóru út at spæla. Ofta varð signað á donskum, og eitt dømi um hesa signing kann verða, at krossmerki verður rist fyri pannu og bringu og sagt verður: Navn *(nert verður við pannuna)*, Gud Fader *(nert verður mitt á bringuna)*, Guds søn *(nert verður høgrumegin á bringuni)*, Guds helligånd *(nert verður vinstrumegin á bringuni)*. Amen.

Tá ið vit njósa, kann verða tikið til: Jesus signi teg. Hetta stavar frá tíðini, tá ið svarti deyði herjaði.

Hans Andreas Djurhuus 1883-1951 var føddur í Havn. Sum ungur fór hann til skips, men í 1901 fór hann á háskúlan í Føgrulíð. Hann tók læraraprógv í 1905. Hans Andreas Djurhuus er kendur fyri sínar barnarímur.

Í lesibókini til 2. flokk *Hervør, Høgni og hini* s. 138 og 139 stendur meira at lesa um Hans Andreas Djurhuus.

Faðirvár er ein kristin bøn, sum stendur í Matteusar evangelii, 6. kap. 9-13 ørindi. Hon ljóðar soleiðis á øðrum málum:

Á donskum

Vor Fader, du som er i himlene!
Helliget blive dit navn,
komme dit rige,
ske din vilje
som i himlen således også på jorden;
giv os i dag vort daglige brød,
og forlad os vor skyld,
som også vi forlader vore skyldnere,
og led os ikke ind i fristelse,
men fri os fra det onde.
For dit er Riget og magten og æren i evighed!
Amen.

Á enskum

Our Father in heaven,
hallowed be your name,
your kingdom come,
your will be done,
on earth as in heaven.
Give us today our daily bread.
Forgive us our sins
as we forgive those who sin against us.
Save us from the time of trial
and deliver us from evil.
[For the kingdom, the power, and the glory
are yours now and for ever.
Amen.]

Á latíni

Pater noster, qui es in cælis,
sanctificétur Nomen Tuum.
Advéniat Regnum Tuum.
Fiat volúntas Tua, sicut in cælo, et in terra.
Panem nostrum quotidiánum da nobis hódie,
et dimítte nobis débita nostra
Sicut et nos dimíttimus debitóribus nostris.
Et ne nos indúcas in tentatiónem, sed líbera nos a Malo.
Quia tuum es regnum, et potéstas, et glória in sæcula sæculorum.
Amen.

Nu lukker sig mit øje,
Gud Fader i det høje,
i varetægt mig tag!
Fra synd og sorg og fare
din engel mig bevare,
som ledet har min fod i dag!

Nú fari eg at sova,
mín Gud tú mást mær lova,
so trygt eitt hvíldarstað.
Um synd og neyð meg herja
lat eingil tín meg verjað,
hann hevur vart mín fót í dag.

Bókalisti

Arbeiðsbók

Tekstaslag: *sangur*.

Uppgáva **2** er ætlað sum bólkaarbeiði ella einstaklingaarbeiði við hjálp frá læraranum. Her er møguleiki at tosa við folk í familjuni t.d. ommur ella abbar at fáa fleiri upplýsingar um bønir. Næmingarnir kunnu skriva á teldu ella við hond, alt eftir hvat teir eru mest tryggir við.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Minst til at biðja faðirvár

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 78

1 **Set rætt orð inn**

Minst til at biðja faðirvár,
minst til at signa teg;
tá sendir Harrin eingil sín
at hjálpa tær á veg.

Og Harrans góðska fylgir tær,
ið hvar tín fótur fer,
og eingilin við tína lið
tær altíð góður er.

Á songarstokki situr hann
og signar svøvnin tín;
hann gevur tær ein ljósan dreym
og leiku fríð og fín.

Og grætur tú, hann kínir tær
og turkar tíni tár –
tí skalt tú altíð signa teg
og biðja faðirvár.

8

2 **Skrivið upp aðrar bønir, sum tit kenna**
Tit kunnu spyrja ommu ella abba ella onkran annan, um tey kenna nakra bøn. Gerið eina lítla bók, sum tit kunnu prýða á ymsan hátt

9



Hugskot


Umrøðuevni

- Dópur og navnagáva
- Navnalisti
- At kalla upp
- Faddrar
- Barsil

Faktapartur

Orðið dópur er úr fornsaksiska orðinum *dopi*, sum merkir at dyppa niður. Upprunaliga er tað ikki ein kristin siður at dyppa barnið í vatn, tá ið tað fær navn, men ein norrøn forkristilig siðvenja, sum er knýtt at Óðinstrúnni. Áðrenn trúbótina var vanligt at dyppa barnið heilt undir í vatni. Í dag er vanligt at lata vatn í høvdið á barninum.

Aðrar trúarrørslur til dømis brøðrasamkoman hevur ikki barnadóp, men vaksnamannadóp.



Bókalisti

Vit fara í kirkju (s. 27-40 um dóp) eftir Elin Mortensen og Guttorm Zachariassen
www.fmn.fo – leinki: fólkanøvn

Arbeiðsbók

Tekstaslag: *tekstur.*

Til uppgávu **1** er umráðandi at læra næmingarnar at skriva heilar setningar. T.d. sum svar til spurningin: Hvussu eitur beiggi Óla? “Beiggi Óla eitur Tórður”

Svarlisti til arbeiðsbók

Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Lítlibeiggi verður doyptur

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 79-80

1 Svara spurningunum
Skriva heilar setningar

Hvør skal doypast?
Hvør verður boðin í barnadóp?
Er beiggi Óla doyptur?
Hvussu eitur beiggi Óla?
Hvør fer í kirkju við Hervør og Høgna?
Hvat geva Hervør og Høgni beiggjanum?
Hvat navn fær beiggin?

2 Být hesi orðini í: navnorð sagnorð

navn, doypa, eita, beiggi, kirkja, velja, gumma, koma, biðja, prestur, keypa, bók, slips, eta, lesa, kjóli, spæla, sunnudagur, nátturði, fortelja.

navnorð	sagnorð
navn	doypa
kjóli	eita
kirkja	velja
gumma	koma
prestur	biðja
bók	keypa
slips	eta
kjóli	lesa
sunnudagur	spæla
nátturði	fortelja


3 Skriva rættan bókstav í rættan rút

Eg eri í hvítari skjúrtu
Eg eri í reyðum slipsi
Eg eri í gráum jakka
Eg siti undir liðini á Høgna
E

Eg eri í ljósareyðari blusu
Eg beri beiggjan
Eg havi gult hár
B

Eg eri í svørtum kjóla
Eg havi eina bók í hondini
Eg havi hvítan kraga
Eg rætti vinstru hond fram
A

Eg eri í brillum
Eg eri í hvítum buksum
Eg havi hvítt belti
Eg eri í ljósabláari blusu
D



4 Skriva um navn títt
Hvørjum eitur tú eftir? Hvør hevur valt navn títt? Um tú ert doypt/ur, kanst tú skriva nøvnini á gummum og gubbum.

10

11

Hugskot Lurtið eftir fløguni og lesið yrkingina saman.

Umrøðuevni At vera uttanfyri, ongan at hava at spæla við og avleiðingarnar av tí. Tosað kann eisini verða um, hvussu sannlík hendan yrkingin er.

Faktapartur Aleksandur Kristiansen er føddur 1949 í Fuglafirði. Aleksandur er útbúgvin lærari frá Føroya Læraraskúla í 1976. Hann er væl kendur í Føroyum sum yrkjari, av yrkingasøvnum til børn kunnu nevnast:
Grísaflísa Pætur, BFL, 1992
Eplapetur, Forlagið Lindin, 1997
Mánadags Mortan, Jens Mortan Mortensen, 2000
Rinkusteinar, FSG, 2001
Lokki litaval, BFL, 2004
Harafturat er fløgan *Sóljudansur*, sum Tutl gav út í 2003.


Arbeiðsbók

Tekstaslag: *sangur.*

Nú kemur fyrstu ferð uppgávuslagið “Hvør eri eg” fyri, (Uppáva **1** og **2**) har næmingarnir mugu blaða upp aftur á síðu 6-9 í lesibókini fyri at finna fram til tað barnið, sum samsvarar við upplýsingarnar. Lærarin kann læra tey at blaða og skimma.

Í uppgávu **3** skal næmingurin skriva yrkingina um til eina søgu. Her kann lærarin hjálpa til við byrjanini.

Svarlisti til arbeiðsbók



Tekstur
Ævintýr
Søgn
Yrking
Sangur
Teknirøð
Faktatekstur
Annað

Grísaflísa Pætur

Hervør og Høgni í triðja • uppgávur til síðu 81

1 **Hvør eri eg?** (hygg á síðu 6-9 í lesibókini)

- Eg havi ein hund, sum eitur Flekk
- Mær dámar væl djór
- Mær dámar at gera fimleik
- Spælivinir mínir eru Vár og Sofía
- Beiggi mín eitur Baldur

Eg eiti A n n a M a r i a

2 **Hvør eri eg?**

- Eg eigi eina tama dunnu
- Mær dámar at dansa
- Eg eigi tveir beiggjar og eina systur
- Foreldur míni eita Bjørk og Símun

Eg eiti U n a

3 **Skriva upp øll endarímini**

grætur	Pætur
grísar	flísar
hárið	sárið
gætur	Pætur

4 **Orð at stava** (Set kross við orðið, tá ið tú dugir at stava tað)

	Stavilsir	Sjálvljóðini	Skriva orðið
☒ Grísaflísa	4	í-a-í-a	Grísaflísa
☒ var	1	a	var
☒ átta	2	á-a	átta
☒ felliknív	3	e-i-í	felliknív
☒ skar	1	a	skar
☒ hygg	1	y	hygg
☒ holuni	3	o-u-i	holuni
☒ rak	1	a	rak

12

5 **Skriva yrkingina um til eina søgu**

13



Føroya Skúlabókagrunnur

ISBN 978-99918-0-969-4